## Nýggjur sendiharri

USA skiftir ofta sendiharrar í ymsum londum aftan á eitt forsetaskifti, og soleiðis er eisini hesaferð. Millum londini, sum fáa nýtt umboð fyri amewrikonsku stjórnina er Danmark, og nú er kunngjørt, at løgfrøðingurin Laurie S. Fulton verður nýggjur amerikanskur sendiharri í Keypmannahavn. Hon tekur við eftir James P. Cain, sum fór frá, tá George W. Bush fór úr Hvítu Húsunum. Laurie S. Fulton hevur verið medeigari í einum stórum sakføraravirki í USA, og fyri fimm árum síðani bleiv hon útnevnd sum ein av teimum fremstu sakførarunum í Washington, sigur DR.



## IA fyri breiðum samstarvi

Herfyri segði formaðurin í grønlendska flokkinum IA, at flokkurin er ikki sinnaður at samstarva við Siumut aftan á valið í næsta mánað, men nú sigur formaðurin, Kupik Kleist, at IA fer at samráðast við Siumut, um IA vinnur valið. Kupik Kleist sigur tó, at tað verður trupult hjá IA at fara í nakað samstarv við Siumut eftir valið. Men IA er sinnað fyri einum breiðum samstarvi í Landstinginum og fer í tí sambandi eisini at samráðast við Siumut um samstarv, sjálvt um útlitini fyri samstarvi millum teir báðar flokkarnar ikki eru serliga góð, sigur Kupik Kleist við kringvarpið KNR.

# Nesbø og Marklund vitja føroyingar





*Jo Nesbø og Liza Marklund vitja fyri fyrstu ferð í Føroyum. Tey verða at hoyra í sendingini Hvonn Live, sum Rás2 sendir í kvøld klokkan 19.00*

**Tveir av fremstu krimi-rithøvundunum í norðurlondum vitja í dag í Føroyum, og føroyingar fáa eisini høvi at heilsa upp á teir báðar stórseljandi rithøvundarnar**

KRIMI-TREFF

*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Norðurlendska krimi-søgan stendur sterkari enn nakrantíð. Sølan av krimi-bókum er munandi vaksin seinnu árini, og summa staðni verður tosað um, at krimi-søgurnar dominerað bókmentamarknaðin ov nógv.

Eisini føroyingar eru tiknir við í rákinum, og krimibøkurnar eru millum bestseljandi útlendsku bøkurnar í Føroyum. Rithøvundar sum Stieg Larsson, Liza Marklund, Jo Nesbø, Anne Holmt, Arne Dahl Camilla Lackberg og aðrir rithøvundar ganga undan , og ein ørgrynna av øðrum rithøvundunum eru við í fylginum.

Í dag vitja tveir av kendastu norðurlendsku rithøvundunum her í Føroyum Svenska krimidrotningin Liza Marklund og norski krimiprinsurin Jo Nesbø vitja eru komintil Føroya at verða við í sendingini Hvonn Live, sum Rás2 sendir í kvøld.

### Marklund

Liza Marklund er víðagitin, umstrídd og populer. Hennara átta spennandi krimisøgur um journalistin Annika Bengtzon selja stórt og hava vunnið fleiri virðislønir, og eisini í Føroyum telist Marklund millum best seljandi rithøvundarnar.

Liza Marklund er ættað úr Norðursvøríki, vann fram sum journalistur í Stockholm, starvaðist sum blaðstjóri, og endaði sum ein tann kendasti norðurlendski rithøvundin í nýggjari tíð.

Norðmaðurin Jo Nesbø er ein av bestu krimi-rithøvundum í Europa í løtuni, og hann hevur fingið virðisløn fyri bestu skaldsøgu í Noregi seinastu tvey árini. Jo Nesbø hevur givið sjey altjóða viðurkendar krimisøgur út, og søgurnar um detektivin Harry Hole eru týddar til 30 mál.

Nesbø hevði ungdómsdreym um at spæla fótbólt í Onglandi, og hann hevur sagt, at hernaðartænasta í Norðurnoregi lærdi hann sjálvdisiplin.

### Vitja føroyingar

Hetta er fyrstu ferð, at Liza Marklund og Jo Nesbø vitja í Føroyum, og føroyingar sleppa í sendingini Hvonn Live á Rás2 í kvøld at hoyra, hvat tey hava upp á hjarta.

Prátað verður við tey um teirra krimi-søgur, um teirra bakgrund í ávíkavist Norðursvøríki og Vesturnoregi, og hvat fær tey at skriva spenningssøgur.

Hvonn Live verður at hoyra á Rás2 millum kl 19.00 og 22.00, og fólk eru eisini vælkomin á Hvonn at lurta.

## Signera bøkur

Fólk sleppa eisini at heilsa upp á Lizu Marklund og Jo Nesbø, nú tey vitja í Føroyum. Eftir prátið við tey í Hvonn Live í kvøld signera tey bøkur. Rit & Rák fer at selja krimi-bøkur hjá Marklund og Nesbø á Hvonn, og fólk kunnu fáa tær signeraðar.

Eisini fáa fólk møguleikan at seta Marklund og Nesbø spurningar í sjálvari sendingini, sum verður send millum klokkan 19.00 og 22.00 í kvøld.

MVH P/F | Á HJALLA 15 | TELEFON 363800

MVH
MASKINVERKSTAÐURIN Á HJALLA



LASTBILUR TIL SØLU

Scania 124, 420 hk • Árgangur 2001
Koyrt 286.000 km
Við HMF krana 3720 K4 + Flyjib 900 K4
Árgangur 2001 • Skiftilastsystemi